gult4 cyan4 magenta4 svart4



Verkfallið:

# Seta byrgingar upp fleiri staðir í landinum

**– Umfatandi smugling fer fram kring landið og tí kanna vit bilarnar, samstundis sum byrgingar verða settar upp fleiri staðni í landinum, sigur Ingeborg Vinther**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

Nú er tað ikki bara í Kollafirði og í Leirvík, at vegirnir verða avbyrgdir fyri at kanna bilar fyri smuglaravørur. Nú eru vegbyrgingar eisini gjørdar fleiri aðrar staðir í landinum.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, segði fyrrapartin í gjár, at at tað fer ein umfatandi smugling fram ymsastaðni í landinum og tí er tað neyðugt at seta fleiri byrgingar upp ysmastaðni í landinum.

Eitt nú er byrging sett upp á vegnum oman til Fuglafjørð. Samstundis er byrging eisini sett upp á bryggjuni í Vestmanna og ætlanin er eisini at gera meiri burturúr at kanna bilarnar, sum fara umborð á Smyril til Suðuroyar.

Bilarnir, sum koyra á hesum strekkkjum, mugu so finna seg í at verða steðgaðir og kannaðir.

Harafturat standa fólk til reiðar fleiri aðra staðni í landinum við. Ikki minst í Suðuroy eru fleiri royndir gjørdar art smugla vørur í land av bátum, sum eru komnir úr Havnini. Men bátarnir eru afturvístir. Eitt nú eru miseydnaðar royndir gjørdar at fáa farm í land í Hvalba, á Tvøroyri og eisini í Vági hava skjóttgangandi bátar verið við varu, men hon er ikki sloppin í land.

Samstundis eru tey eisini farin at hava eitt vakið eyga við postbilnum, tí tey hava varnast, at postbilarnir eisini eru farnir at flyta farm. Tí fara tey nú at kanna postbilarnar í størri mun, enn tey hava gjørt.

Týsdagin førdi tað við sær, at ein postbilur, sum skuldi vestureftir, varð steðgaður í Kollafirði og mátti venda aftur, tí hann var fullur av farmi.

Verkfalsvaktirnar halda, at hetta er ábyrgdarleyst av postverkinum, tí postbilarnir føra eisini neyðsynjarvøru, eitt nú heilivág, og tá ið postbilurin noyðist at venda aftur, kemur heilivágurin heldur ikki fram.

## Ikki privatfólk

Orsøkin til alt hetta hóvastákið er at forða fyri, at handilsvøra verður flutt inn á verkfalsrakt øki, sigur Ingeborg Vinther.

Men hon leggur dent á, at tey eru ikki úti eftir fólki, sum hava verið í Havn og keypt ymiskt til egna nýtslu.

–Vit eru ikki úti eftir privatfólki. Vit taka ikki fólk, sum hava verið í Havn og keypt ein eplasekk, ella tveir, ella aðra varu til sín sjávs, tí tað tænir ongum endamáli.

– Men tað eru mong, sum royna at brúka persónbilar til at smugla vørur í, sum ætlanin er at selja víðari og tað eru hesir bilarnir, sum verða steðgaðir.

Hon sigur, at tað kemur meiri enn so fyri, at persónbilar koma søkkladnir framvið byrgingina og tá er tað sjálvsagt, at talan er ikki um varu til egna nýtslu, men at ætlanin er at selja hana víðari í ymsum handlum.

Eitt nú var ein bilur steðgaður í Kolafirði nú ein dagin við fullum viðførisrúmi av bananum og hann mátti venda við aftur, tí tað var trupult hjá honum at sannføra verkfalsvakirnar um, at hetta var til egnu nýtslu. Og skuldi hann roynt at bilt teimum inn, at hann hevði apur kjallaranum, høvdu tey neyvan trúð honum heldur…

*Ongin sleppur ígjøgnum nálareyga í Kollafirði, men nú eru byrgingar settar upp fleiri aðra staðni eisini*



# Ætla at geva okkum minni lønarhækking

**Framferðin hjá semingsstovninum og arbeiðsgevarunum er óhoyrd í nýggjari fakfelagssøgu, sigur Føroya Arbeiðarafelag**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

–Limirnir í Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag skulu fáa 2,5% minni í lønarhækking, enn Havnar Arbeiðsmannafelag og arbeiðarafeløgunum í Klaksvík, hava fingið.

– Hetta var ætlanin hjá Semingsstovninum og Føroya Arbeiðsgevarafelag, siga Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Tey bæði feløgini siga, at eftir at hava havt fund við arbeiðsgevararnar, løgdu semingsmenninir eitt uppskot fram, sum hevði givið feløgunum, sum nú eru í verkfalli, eina lønarhækking, sum var 2,5% lægri , enn Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík høvdu fingið.

Tað, tey sipa til, er, at í seinastu samráðingunum í 1999, fingu Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag eina hægri lønarhækking, enn Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík hava fingið.

–Men eftir semingsuppskotinum, sum varð lagt fram í hesum samráðingunum, skuldi lønin verða tann sama hjá øllum feløgunum. Sostatt var ætlanin, at vit hesuferð skuldu fáa eina lønarhækking, sum var 2,5% lægri enn tann, sum Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík hava fingið.

Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag, siga, at hetta er óhoyrt í nýggjari fakfelagssøgu og at tey kundu sjálvsagt undir ongum umstøðum góðtaka eina slíka ráðagerð ímóti limum felagsins, sum teu nevna tað.



*Ætlanin er at vit skulu fáa minni í lønarhækking, enn Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík hava fingið og tað góðtaka vit sjálvsagt ikki, sigur Ingeborg Vinther*

## Undanførsla

Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag siga, at tað er onki uttan undanførsla, tá ið Føroya Arbeiðsgevarafelag sigur, at hetta verður gjørt fyri at sleppa undan ójavnum í sáttmálunum.

–Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur áður góðtikið, at júst limirnir í Havnar Arbeiðsmannafelag fingu 1% meiri í løn, enn limirnir í hinum arbeiðarafeløgunum hava fingið.

–Tá var tvær ferðir neyðugt hjá hinum feløgunum at fara í verkfall, fyri at fáa hendan ójavnan innaftur.

Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag vísa eisini á, at í 1999, tá ið samráðingar vóru seinast, høvdu Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík als ikki settu fram krav um at fáa tær sømdir, sum Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag, fingu.

Tí kann tað ikki vera rætt, at tey nú skulu fáa hesar ágóðar framíhjá og sostatt fáa eina lønarhækking, sum er 2,5% ægri enn tað, sum Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag, kunnu fáa.

–Sostatt er tað eisini beinleiðis átaluvert, tá ið Føroya Arbeiðsgevarafelag roynir at geva fólki tað fatan, at øll feløgini hava fingið tilboð um somu lænarhækking, tí tað er skeivt.

Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag siga, at tey fara ikki at góðtaka, at teir 8.000 limirnir í teimum báðum feløgunum, skulu fáa eina lægri lønarhækking í ár, enn hini feløgini hava fingið.

# Nógv vilja hava undantaksloyvi

**Tað er ógvuliga hart trýst á Føroya Arbeiðarafelag fyri at fáa undantaksloyvi til alt handa slag**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*



*– Tað eru ákoyringar á Føroya Arbeiðarafelag eftir at fáa undantaksloyvi til alt handa slag*

Hesar dagarnar, verkfallið hevur verið, hevur verið rættiligur telefonstormur hjá Føroya Arbeiðarafelag.

Ikki minst er rættiligur ágangur á felagipð um at fáa undantaksloyvi til alt møguligt.

Bara eina lítla løtu, Sosialurin var inni á gólvinum, var tað ein maður úr Eysturoynni, sum hevði verið í Klaksvík og keyp melassu til nakrar kálvar, sum var steðgaður í Leirvík og sum vildi hava undantaksloyvi at sleppa víðari.

Ein maður úr Vágum ringdi og gramdi seg um, at hann fekk ikki heilivág, hann hevði brúik fyri, tí postbilurin slapp ikki ígjøgnum byrgingina í Kollafirði.

Tey máttu so greiða honum frá, at orsøkin til, at postbilurin fekk boð um at venda við aftur,var, at hann var fullur av øðrum farmi, sum onki hevði við post at gera.

Ein kona, sum var limur í Føroya Arbeiðarafelag, ringdi at spyrja um hon kundi átaka sær nakrar vik artímar, sum henni stóð í boði at hava í skúlanum, hóast hon var í verkfalli.

Ingeborg Vinther sigur, at hetta eru bara nøkurfá dømi um, hvat fólk biðja um undantaksloyvi til.

Hon sigur at tað er heldur ikki óvanligt at biðja um undantaksloyvi til at fáa mat og aðra varu til eitt brúdleyp, silvurbrúdleyp, gullbrúdleyp, rundan føðingardag, ella annan hátíðardag.

– Vit viðgera allar umsóknir vit fáa og so taka vit støðu í hvørjum einstøkum føri, sigur hon. Men hon sigur, at tey fara ikki at nokta fólki at fáa varu til eitt brúdleyp ella til ein rundan føðingardag. Men áðrenn undantaksloyvi verður givið, kanna tey málið í hvørjum einstøkum føri fyri at vita, um talan veruliga er uym brúdleyp, ella annan hátíðardag.

Annars sigur Ingeborg Vinther, at undantaksloyvi verður ikki givið til vanligan farm.

gult5 cyan5 magenta5 svart5



# Skulum vær nú til Havnar suður

**Stór dansistevna verður í Havn leygardagin. Umleið 600 dansifólk úr øllum landinum fara at hittast. Setanin, sum verður á Vaglinum klokkan 15.00 er almenn, meðan restin av tiltakinum bert er fyri tey, sum tilmeldað eru**

FØROYSKUR DANSUR
*Edvard Joensen*



*Vága Dansifelag tók stig til fyrstu landsdansistevnuna, sum varð hildin í Vágum í 1983*

*Myndin er frá dansiferð í Noreg í fjør*

Leygardagin klokkan 15.00 verður stóra dansistevnan sett á Vaglinum í Havn. Tá hittast fólk úr øllum dansifeløgunum í landinum.

Heðin Mortensen, formaður í mentunarnevnd Tórshavnar Býráðs fer at seta stevnuna. Eftir sjálva setanina verður tikið saman á Vaglinum, har Martin Tórgarð fer at skipa eina stutta vísu.

Fyrireikararnir av dansistevnuni, sum eru tey trý dansifeløgini í Havn, Tøkum Lætt, Dansifelag Kaggans og Dansifelagið í Havn, leggja dent á, at setanin á Vaglinum er einasta almenna tiltakið, sum verða á stevnuni. Restin av stevnuni er fyri teir tilmeldaðu luttakararnar.

Eftir setanina verður farið niðan í Ítróttarhøllina á Nabb, har borðhald verður fyri teimum 600 luttakarunum. Eftir døgurðan í ítróttarhøllini verður farið oman í Sjónleikarhúsið, har dansað verður til tann ljósa morgun.

Fyrireikararnir siga, at teir hava fingið alt Sjónleikarhúsið, sum tað er. Og teir leggja dent á, at hølini aftan fyri sjálvan salin eru tey rúmligaru hølini, so umstøðurnar verða góðar hjá fólki at hittast, um farið verður niður úr ringinum eina løtu. Móti morgni veðru morgunmatur, smurt breyð, at fáa í Sjónleikarhúsinum.

Stevnan er skipað á tann hátt, at hvørt felag møtir við sínum kvæði ella vísu. Skráin, sum hevur verið at fingið í Kunningarstovuni í Havn nú eina tíð, sær soleiðis út:

Norðstreymoyar Dansifelag: Tróndar kvæðið - Dansifelag Kaggans: Fípan Fagra - Nólsoyar Dansifelag: Fruntatáttur - Vága Dansifelag: Grindavísan - Tvøroyrar Dansifelag: Brestis kvæði - Dansifelagið í Havn: Jallgríms kvæði - Klaksvíkar Dansifelag: Viljorm Kornus kvæði - Tøkum Lætt: Hafburd Konge og Sivard Konge - Sumbiar Dansifelag: Herr Ålebrands vísa - Eysturoyar Dansifelag: Kong Hans - Dansifelagið í Suðuroyar norðaru helvt: Jøkils kvæði - Jómsvíkingar: Vilmunds kvæði og Stigum fast: Santa Jákups vísa.

Landsdansistevnan varð á fyrsta sinni hildin í 1983. Tað var Vága Dansifelag, sum tók stig til stevnuna, sum eisini varð hildin í Vágum ta ferðina. Síðan hevur hon verið hildin av dansifeløgunum kring landið, og er nú komin runt. Tó hevur hon einaferð fyrr verið hildin í Havn, men síðan tá er okkurt felag komið aftrat í Havn, og hevur tað so gjørt, at hon aftur verður í Havn hesaferð.

# Vinnmenn




*Edward Fuglø hevur myndprýtt bókina um føroysk kvæði, sum Árni Dahl hevur lagt til rættis*

**Nýggj bók um føroysk kvæði kemur út, samstundis sum Landsdansistevnan verður sett á Vaglinum í Havn leygardagin**

MENTAN
*Edvard Joensen*

Nýggj bók við fimm kvæðum, sum yrkt eru við evnum úr Føroyingasøgu, kemur út leygardagin. Árni Dahl hevur lagt til rættis, Edward Fuglø hevur myndprýtt, og Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur út.

Kvæðini, sum viðgjørd verða í bókini, eru Brestis kvæði og Sigmundur og Tórir, sum Mikkjal á Ryggi yrkti, Bjarnabani, sum Jeffrei Henriksen yrkti og Sigmunds kvæði yngra og Leivs kvæði, sum Jens Christian Djurhuus, Sjóvarbóndin, yrkti.

Undan hvørjum kvæði er stutt frágreiðing um søgugongdina, og harafturat eru orðafrágreiðingar á hvørjari blaðsíðu, so ung fólk lætt kunnu fáa greiði á torskildum orðum og máliskum, sigur Bókadeildin í tíðindaskrivi.

Heitið á bókini, Vinmenn, sipar til teir báðar Sigmund og Tór, sum eru høvuðspersónarnir í teimum kvæðunum, sum viðgjørd verða í bókini.

Vinmenn er givin út eftir áheitan frá Sláið Ring, sum er landsfelag hjá føroysku dansifeløgunum. Landsfelagið hevur sett pening av til tess at gera tilfar, sum kann kunna ungfólk um føroyskan dans og kvæði. Bókin, sum nú verður givin út, er úrslit av arbeiðinum, sum ein arbeiðsbólkur, ið settur varð til endamálið, hevur gjørt.

Vinmenn er 70 blaðsíður í litum. Bókin er innbundin og fer at kosta 150,- krónur í bókabúðunum. Hestprent hevur staðið fyri repro, umbróting og prenti.

Í samband við at Landsdansistevnan verður sett á Vaglinum leygardagin 19. mai kl. 15.00, verður stutt framløga í Býráðssalinum beint eftir setanina, har greitt veðrur frá bókini, sigur Bókadeild Føroya Lærarafelags.